## DAGSINS MEINING

# Eitt syndarligt met

Í nátt var maður tikin av døgum í North Carolina og var við hesum sett enn eitt syndarligt met í rættarsøgu USA. Síðan deyðarevsingin varð tikin uppaftur fyri nøkrum árum síðan, eru nú eitttúsund fólk tikin av døgum í USA. Við hesum hagtølum er USA komið upp á síðuna á Kina og Iran, so ikki kann annað sigast enn, at tað er eitt syndarligt met, USA nú hevur sett. USA er tað land í vesturheiminum, sum burturav fremur mest deyðadómar. Alt fleiri lond sleppa hesi barbarisku revsing. Mannarættindafelagskapir, ið fylgja hesum máli væl, vísa á, at alt fleiri lond nú duga at síggja, at deyðarevsing er ikki ein revsing at nýta í framkomnum og siviliseraðum landi.

Amnesty og aðrir felagskapir hava staðfest, at deyðarevsing er ein eyðmýkjandi og barbarisk revsing. Henda revsing er endalig og kann tí ikki bøtast, um tað eftirfylgjandi vísir seg, at tann avrættaði var ósekur. USA er vorðið sum tess forseti. Meðan Bush var guvernørur í Texas lat hann eini hálvtannaðhundrað fólk taka av døgum. Hann eirdi av princip ongum. Trúgvi ráðgevi hansara í hesum førinum, sakførarin Gonzales, varð herfyri lyftur upp í hægsta rættarsessin í USA, til løgreglumálaráðharra. Hetta, at heimsins undangonguland innan fólkaræði og frælsi eisini gongur á odda saman við einaræðislondum at fremja deyðadómar, er sera vandamikið, hugstoytt og andstyggiligt. Deyðrevsing er ein ræðulig revsing, og henda revsing er ikki bert ræðulig fyri tann, ið verður avrættaður, men eisini fyri slekt, vinir og fyri tey starvsfólk í fongslunum, sum skulu fremja deyðadómar. Henda revsing virkar forráðandi og hvat verri er: hon minkar ikki um lógarbrotini í viðkomandi landi.

USA hevur sett seg á odda í eini altjóða herferð fyri betri mannarættindum. Samstundis sum USA rekur hesa herferð, verður ein gøla fyri og onnur eftir avdúkað um píning, loynifongsul, fangalegur í frammandum londum og um fólk, sum bara hvørva, alt meðan sporini leiða til CIA ella FBI. Hetta ber ikki til í longdini. Einki fólkaræði kann yvirliva við slíkum skuggasíðum. Hinvegin er einki, sum bendir á, at USA er um at broyta kós. Heldur er tað tvørturímóti so, at forsetin og ráðgevar hansara ætla at herða hesa ódemokratisku og vandafullu kósina. Henda kósin hjá USA setir alt tað vesturlendska samstarvið í vanda, Fyrr ella seinni noyðast vesturlendsku fólkaræðini at siga til og so kemur øll samgonguskipanin við NATO og ES í stóran vanda. USA og vinir tess eru í moralskari kreppu orsakað av harðrendu innanríkispolitisku kósini hjá Bush og orsakað av krígnum í Irak. Hetta endar galið, um ikki tað eydnast vinum USA at fáa stórveldið at broyta kós úti og heima.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til H. A. Lindarstein um »lítla Petur«

**Maria Jacobsen**

Í lesarabrævi ì Dimmalætting 30.11.2005, nevnt »Ambulansutænasta við meira« hjá H. A. Lindarstein (H.A. L.), verður m.a. nomið við tíðindaflutning hjá Útvarpinum um málið um »lítla Petur«.

H.A.L. heldur, at Útvarpið hevur brúkt alt ov nógva tíð til umrøðu av hesum máli og sigur, at Útvarpið hevur viðgjørt málið "í allar endar og kantar" og sýnist at hava hetta mál til undirhalds.

Hetta mál, ið hevði so stórar menniskjaligur fylgjur fyri Petur og systrarnar, at sárini helst ongantíð lekjast, er størsti sorgarleikur í nýggjari, føroyskari sosialsøgu.

H.A.L. hevur púra rætt í, at tað áttu at verið bæði stovnar og nevndir, ið viðgjørdu hetta mál. Her kunnu t.d. nevnast Løgtingsins Umboðsmaður og M.B.F. Ikki minst politisku flokkarnir áttu at tikið hetta mál í størsta álvara, og sæð til, at óheft kanning varð sett í verk (eins og í málinum um Jøkulfell, har óhefta kanningin kom til øðrvísi úrslit enn eftirmetingin hjá Fiskimálaráðnum).

Var niðurstøðan í óheftari kanning, at "alt er farið rætt fram í málsviðgerðini í Føroyum", soleiðis sum landsstýrismaðurinílalmannamálum og borgarstjórin í Tórshavn halda fast um, kundi Føroya fólk kent seg trygg við málsviðgerð av barnaverndarmálum í framtíðini.

At Útvarpið ikki hevur gjørt meira við tann partin av málinum – at eingin í politiska umhvørvinum heldur tað hava týdning at kanna málsviðgerðina í Føroyum - er fyri mær óskiljandi.

**N.B.** Var eg málsviðgeri í hesum máli ella borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu og fullvís í, at altvar farið rætt fram, hevði eg biðið um eina kanning, soleiðis at umsitingin hjá kommuni kundi blivið "reinsað" fyri allar ákærur um skeivleikar.

# Spurningar til Jákup Mikkelsen (2)

**Eivind Ortind Simonsen**
*Viby J*

**Birita Lamhauge Jóansdóttir**
*Ålborg*

Fyri eitt sindur av tíð síðan settu vit nakrar spurningar til Jákup Mikkelsen. Vit fingu ongantíð eitt svar. Tískil føla vit okkum nú noydd til at seta somu spurningar enn eina ferð.

Vit høvdu tríggjar spurningar til eina almenna útsøgn hjá Jákup Mikkelsen. Hansara útsøgn kom í samband við viðgerðina av lógaruppskotinum hjá Finni Helmsdal og Anitu á Fríðriksmørk um diskriminering vegna kynsliga sannføring, og framsetti hann hana sum framsøgumaður hjá flokkinum í hesum málið. Orðini hjá Jákup Mikkelsen vóru hesi: "Tað er ikki rætt at lóggeva fyri ein einstakan bólk. Og harafturat er tað ímóti kristnu siðalæruni at vera samkyndur". Okkara spurningar tóku allir útgangsstøði í hesi útsøgn.

Tann fyrsti spurningurin viðgjørdi hetta at lóggeva fyri einstakar bólkar. Vit góvu eitt dømi um eina lóg, sum er viðtikin í Løgtinginum, og sum nettupp er gjørd fyri ein einstaka bólk. Nemliga lógina um, at samkomuleiðarar, í øðrum samkomum enn Fólkakirkjuni, eisini kunnu víga hjún. Um tað er so skeivt at lóggeva fyri einstakar bólkar, hví hava vit so hesa lógina?

Tann næsti spurningurin viðgjørdi sjálvt lógaruppskotið sett upp ímóti hugtakinum "einstakur bólkur". Í lógaruppskotinum stendur beinleiðis, at tað skal vera mett sum lógarbrot, at diskriminera vegna kynsliga sannføring. Okkara páestandur er, at kynslig sannføring IKKI dekkar ein einstakan bólk, men allar føroyingar. Fyri okkum sær tað út sum um, at Fólkaflokkurin ikki er samdur í hesum. Hevði tú tíma at greitt nærmari frá tykkara støðu til hendan spurning?

Tann triði spurningurin umrøddi tað kristnu siðalæruna og hennara kvalifikatión, sum grundarlag undir okkara lógum. Vit góvu 3 dømi um ting, nevnd í bíbliuni, sum ikki eru galdandi í okkara lógarverki. Tey 3 dømini vóru um neyðtøku, trælahald og samfelagsskipan. Spurningurin var so: um bíblian og tann kristna siðalæran er so væl egna, sum grundarlag undir okkara lógum, hví roynur Fólkaflokkurin so ikki at bera so í bandi, at allar tær føroysku lógirnar samsvara við bíbliunnar orð?

Vit høvdu ein síðsta spurning, men hann var settur beinleiðis til Jákup Mikkelsen. Hann hevði nakað at gera við, at Jákup segði seg stúra fyri, at hetta lógaruppskot bleiv viðtikið, so vildu uppskot, sum vóru hvaðan verri fylgja. Spurningurin var so, hví Jákup velur at stúra fyri frammtíðini ístaðin fyri at meta um, hvussu relevant hetta lógaruppskot er? Fjalt í hesum lá tann sannleikin, at okkara virðir broytast, og at tað sum vit halda vera rætt í dag, ikki var tað sama, sum fólk fyri 50 árum síðan hildu vera rætt. Hvat fær so Jákup Mikkelsen til at halda, at tey virðir sum vit hava í dag, eru tey somu í 2055? Og hví stúra fyri hesum?

Vit vilja gjarna hava eitt svar uppá hesar spurningar. Um Jákup Mikkelsen ikki sær seg føran fyri at svara, so má onkur annar úr Fólkaflokkinum, sum deilir hansara sjónarmið, gjarna svara. Um ongin í Fólkaflokkinum sær seg føran fyri at svara, so má onkur annar føroyingar, sum deilir sjónarmiðini hjá Jákup Mikkelsen, gjarna svara. Um ongin sær seg føran fyri at svara, so mugu vit bara staðfesta, at tykkara mótstøða móti hesum lógaruppskotið byggjur meira á fordómar og óvitan enn á rationella og logiska argumentatión.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.